# Hópuppsagnir í Vestmanna

**30-40 fólk eru søgd úr starvi á fiskavirkinum í Vestmanna. Umlegging av arbeiðinum, og minni fiskur er komin upp á land eru orsøkirnar, sigur Meinhard Jacobsen, stjóri í United Seafood**



UPPSAGNIR

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Tað er ein keðiligur dagur í Vestmanna í dag.

Í gjár fingu nøkur starvsfólk á fiskavirkinum uppsagnarbræv, og fleiri hava fingið sama bræv í dag.

Sosialurin skilir, at millum 30 og 40 uppsagnarbrøv eru skrivað.

Ein stórur partur av starvsfólkunum sótu á fundi fyrrapartin, og tí fekst ikki orð á nakran, og stjórin Jákup Eli Thomsen vil einki siga. Hann vísir til stjóran í Faroe Seafood, Meinhard Jac0oben.

- Hetta er ein tilgongd, sum byrjaði í desember mánaði við umlegging av arbeiðinum, sigur Meinhard Jacobsen.

## Effektivisering

Virkið hevur fingið nýggja skerilinju, sum bara krevur átta fólk, og tí kann virkið vera nøkur fólk fyriuttan.

Tað eru ikki 30-40 ársverk, sum spard eru burtur. Nøkur av fólkunum hava arbeitt parttíð.

- Tað er eisini tað, at minni fiskur er komin upp á land í mun til, hvat vanligt er hesa ársins tíð. Fiskiskapurin hevur verið nógv vánaligari, sigur Meinhard Jacobsen.

Hann sigur, at virkið noyddist at gera umleggingarnar, tí tað ræður um at fáa meira fyri hvørja krónu.

Lítið arbeiði hevur verið á fiskavirkinum í Vestmanna síðan í summar. Flestu vikurnar hevur arbeiði bara verið tveir ella tríggjar dagar.

Sosialurin tosaði í morgun við formanninum í Vestmanna Arbeiðarafelag, Jónfinn Klein. Felagið var ikki kunnað um uppsagnirnar.

ÚTSØLAN
byrjar fríggjamorgunin 29. januar kl. 10.00

Olymp skjúrtur
í nógvum flottum litum
áður 798,- 698,-
Nú bara 398,-
Tak tvær - bara 600,-

Flottir klæðningar
svartir og strípútir
áður 3198,-
nú bara 1998,-



Meyer buksur
ull/ floyal
- áður 998,-
Nú 598,-



Eton skjúrtur
áður 998,-
Nú bara 598,-
Tak tvær - bara 1000,-



Svartir blazarar
áður 1498,-
nú bara 898,-

Meyer klæðningsbuksur
bummull/ stretch
- áður 998,-
Nú
tak tvinnar - bara 1200,-



Slips - silki
áður 398,-
Nú bara 100,-



Klæðningsjakkar
áður 1998,-
nú bara 998,-

Gant jakkar
- áður 1998,-
Nú bara 998,-

Arbeiðs-cowboybuksur
Einar 298,- Tvinnar 300,-

Stuttir vetrarjakkar
áður 998,-
nú bara 598,-

Gant troyggjur
- áður 798,-
Nú bara 498,-

... og nógv annað!

Smyrilsvegur 7 · Tel 317210 · Fax 317806

Hans Joensen
Síðan 1889